UTTAN ÚR HEIMI

Fleiri koyra við kenning

Í fjør tók danska løgreglan 15.883 fólk, sum koyrdu við kenning, og tað var næstan 25 prosent fleiri enn fyri sjey árum síðani.

Men nógv bendir á, at tað er uppaftur verri í ár. Nordjyske Stiftstidende skrivar, at verður gongdin tann sama teir næstu mánaðarnar sum somu mánaðir í fjør, fer talið upp um 16.000 í ár. Tað merkir samstundis, at árið í ár verður tað ringasta síðani 1992.

Asger Lund Kristensen, sum er varaleiðari hjá ferðsluløgregluni, sigur, at løgreglan hevur lagt størri dent á at taka fólk, sum koyra við kenning, men hann sigur, at tað er kortini ikki tann einasta orsøkin til, at fleiri verða tikin. Hann vísir á, at síðani promillumarkið bleiv lækkað úr 0,8 í 0,5 fyri seks árum síðani, er talið á ávirkaðum bilførarum vaksið á hvørjum ári. Danska Ráðið fyri Ferðslutrygd sigur, at rúsadrekka er orsøkin til fjórðingin av ferðsluvanlukkunum á teimum donsku vegunum.

Bretar í verkfall

Ósemja um lønina hjá teimum, sum arbeiða á innanríkisrutunum hjá bretska flogfelagnum British Airways, hevur fingið starvsfólkini at boða frá verkfallið um vikuskiftið.

Fakfeløgini og leiðslan í British Airways hava leingið tingast um sáttmáliaviðurskiftini, uttan at nakað er komið burturúr. Mánadagin boðaðu starvsfólkini frá, at tey fara at leggja arbeiðið niður í 24 tímar tann 27. august. Tað fekk leiðsluna í flogfelagnum at koma við einum nýggjum tilboði um at bøta um sáttmálan, men starvsfólkini eru als ikki nøgd.

Í gjár boðaðu fakfeløgini frá, at tey, sum taka ímóti ferðafólki, fara í verkfall um vikuskiftið, og tað sama verður við teimum, sum taka sær av viðførinum hjá ferðafólkunum. Tað fer at raka allar tær stóru floghavnirnar, og bretsku loftferðslumyndugleikarnir stúra fyri rættiligum ruðuleika í loftferðsluni um vikuskiftið.

Arbeiðsloysiðfer at minka

Danska ídnaðarfelagið væntar, at arbeiðsloysið í Danmark fer at minka tey bæði næstu árini.

Framrokningar hjá felagnum siga, at minkingin verður ikki stór í ár, men at so fer ferð at koma á. Ídnaðarfelagið væntar, at 30.000 nýggj arbeiðspláss koma afturat næsta ár, og at nógv tey flestu vera í teirri privatu vinnuni. Tað verða yvirhøvur arbeiðsleys, sum fara at manna tey nýggju arbeiðsplássini, og tí væntar ídnaðarfelagið, at arbeiðsloysið fer at minka. Felagið væntar, at 17.000 arbeiðsleys fáa arbeiði næsta ár, og at 13.000 afturat fáa arbeiði í 2006. Heldur hetta, verða umleið 145.000 danir arbeiðsleysir við árslok í 2006, og so lítið hevur arbeiðsloysið ikki verið síðani tíðliga í 2002.

Orsøkin til bjartskygnið hjá ídnaðarfelagnum er, at tað gongur tann rætta vegin í danska búskapinum. Tann privata nýtslan veksur, og harafturat veksur útflutningurin eisini.

Taka undir viðpíning

Meiri enn 40 prosent av amerikanarunum halda, at tað er í lagi at nýta píning, tá yvirgangsmenn verða avhoyrdir.

Tað kemur fram í einari kanning, sum stovnurin Pew Research Center hevur gjort. Har siga 48 prosent av teimum spurdu monnunum og 36 prosent av kvinnunum, at tað er rætt at nýta píning, tá fólk, sum eru undir illgruna fyri at hava samband við yvirgang, verða avhoyrd. 53 prosent av teimum spurdu siga, at veruligur harðskapur skal bara brúkast, um tað er heilt neyðugt, men 43 prosent siga, at tað er ongantíð rætt at nýta veruligan harðskap undir avhoyringum.

Sambært Pew Research Center vísir kanningin eisini, at tað eru serliga fólk, sum ætla sær at velja George W. Bush á valinum í heyst, sum halda tað vera í lagi at nýta píning. Tey, sum ætla sær at velja John Kerry, eru yvirhøvur ímóti.

Skúlarnir verða brendir og lærararnir dripnir

Teir vápnaðu arabisku álopsmenninir í sudanska landspartinum Darfur eru eirindaleysir, og teir fáa góða hjálp frá sudansku stjórnini.

Børnini í Darfur sleppa ikki í skúla, tí teir arabisku álopsmenninir hava brent skúlarnar og bøkurnar. Teir lærararnir, sum ikki fingu stundir at flýggja, eru myrdir

DARFUR
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Altjóða samfelagið gav herfyri sudansku stjórnini boð um at steðga áganginum ímóti fólkinum í landspartinum Darfur innan 30 dagar. Men sambært tveimum blaðmonnum hjá Washington Post, sum júst hava verið har, heldur ágangurin fram.

Teir báðir blaðmenninir siga, at ágangurin er væl skipaður, og at endamálið tykist vera at trælbinda fólkið, at fáa tað at gloyma sína fortíð og sína tilveru og at oyðileggja tess politisku orku.

Sum lið í átakinum hava álopsmenninir sett eld á at kalla allar skúlarnar, soleiðis at nógvastaðni hava børnini ikki havt nakran skúla í næstan tvey ár. Tey hava heldur onmgar bøkur, tí tær hava álopsmenninir skrætt ella brent. Lærararnir sleppa heldur ikki undan áganginum. Tvørturímóti noyðast teir at taka til rýmingar, tí álopsmenninir tykjast hava ta uppfatan, at øll, sum duga at lesa og skriva, eru uppreistrarmenn og ein hóttan ímóti sudanska samfelagnum. Teir lærararnir, sum eru so seinir at flýggja, verða myrdir.

Mannarættindafelagskapurin Human Rights Watch váttar tað, sum teir báðir amerikonsku blaðmenninir siga. Felagsskapurin sigur seg eisini have fleiri dømi um, at teir sudansku myndugleikarnir stuðla áganginum hjá teimum arabisku álopsmonnunum.

– Afrikanararnir hava sagt mær, at um teir biðja løgregluna um hjálp, tí arabarar gera seg inn á teir, letur løgreglan ikki við seg koma. Men soleiðis er tað í øllum viðurskiftum her, sigur Olivier Bercault hjá Human Rights Watch.

ST metir, at umleið ágangurin í Darfur hevur kostað umleið 50.000 mannalív, og at umleið hálv onnur millión fólk eru flýdd frá húsi og heimi undan álopsmonnunum.

Eingin vetur um 70 ár

Tann veksandi hitin á Jørðini kann hava við sær, at um eini 70 ár verður eingin vetur á okkara leiðum, tí hitin veksur skjótast í Evropa

Hava veðurlagsgranskararnir rætt, sleppa vit frá at grava kava um eini 70 ár

VEÐRIÐ
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Hava veðurgranskararnir hjá evropeiska umhvørvisstovninum EEA rætt, fer veðrið á okkara leiðum at broytast nógv hesa øldina.

Í einari frágreiðing, sum granskararnir løgdu fram í gjár, stendur millim annað, at hitabylgjur og vatnflóð verða munandi meiri vanligar enn í dag, og at um 50 ár verður bara ein fjórðingur eftir av kavanum í teimum sveitsisku Alpunum.

– Tann kaldi veturin fer at hvørva innan 2080. Samstundis verður summarið heitari og turrari, men vit kunnu eisini væntа meiri regn aðrar tíðir á árinum enn nú, siga granskararnir.

Jaqueline McGlade, stjóri í EEA, segði á tíðindafundi í Amsterdam, at veðurlagsbroytingarnar fara at hava stórar avleiðingar, bæði búskaparligar, menniskjaligar og umhvørvisligar.

Í frágreiðingini vísa granskararnir á, at síðani 1990 hava vanlukkurnar, sum hava staðist av veðrinum, verið tvær ferðir so nógvar í tali sum í árunum frá 1980 til 1990. Tær hava eisini verið dýrar. Sambært granskarunum hava veðurvanlukkurnar kostað einar ellivu milliardir dollarar um árið síðani 1990. Teir siga, at vit mugu venja okkum við bæði vatnflóð og turk, soleiðis sum vit eisini hava sæð í Evropa tey seinastu árini.

Í fjør doyðu umleið 80 fólk av vatnflóð í ellivu evropeiskum londum, og hitabylgjan, sum herjaði stórar partar av Evropa í fjør, kravdi meiri enn 20.000 mannalív.

Hermann Oskarsson ávarar landsstýrið:

Latið rækjuskipini fara

Formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, mælir harðliga landsstýrinum frá at seta skipanina við afturbering av skatti til rækjuvinnuna í verk. Hann heldur, at skipini sum ikki bera seg, eiga at fara úr flotanum

– Seinastu árini hava nógvar atfinningar verið um, at fleiri skip hava verið noydd at býta rækjukvoturnar.Varðveita vit tey frægastu skipini í flotanum og lata hini fara, verður meira í part. Við størri kvotum verður betri møguleiki hjá rækjuskipunum at klára seg, sigur formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson

Mynd: Savnsmynd

STUÐUL TIL RÆKJUVINNUNA
Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

– Eg haldi snøgt sagt tað er burturvið, at konkurslógin ikki er galdandi í fiskivinnuni, tá flest allir aðrir vinnubólkar eru fevndir av lógini. Flestu rækjuskipini fingu hjálp frá tí almenna, tá tey vórðu sanerað í 1999, men uttan úrslit. At tveita enn fleiri pengar í skip, sum ikki bera seg, er satt pengaoyðsl.

Formaðurin í Búskaparráðnum, Hermann Oskarsson, heldur lítið um ætlanina hjá landsstýrinum at seta eina skipan í verk við afturbering av skatti til kreppurakta rækjuflotan.

Í Degi og viku týskvøldið segði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, at hann í løtuni arbeiðir við einum uppskoti um eina skipan við afturbering av skatti í tvey ár til rækjuflotan. Sum skilst eru Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin sinnaðir at seta hesa skipan í verk, meðan Javnaðarflokkurin er í bíðistøðu.

Søgulig rættindi

Ein av afturvendandi grundgevingunum hjá sitandi samgongu fyri at veita rækjuvinnuni eina hjálpandi hond er, at verður bert latið staðið til, er stórur vandi fyri, at søguligi veiðurættindi gleppa føroyingum av hondum.

– Tað avgerandi er, um vinnuligt virksemi ber seg ella ikki. Hvørt vit hava vera avgerandi, tí vit hava ikki ráð at lata skattaborgaran gjalda fyri, at einstakir partaeigarar varðveita serrættindi í fremmandum sjógvi. Ber ein vinna seg ikki, so fer eingin at leggja egnar pengar í váða fyri miss. Hví skuldi landskassin farið at oyðsla skattaborgarans pening til slíkt virksemi?, spyr Hermann Oskarsson.

Formaðurin í Búskaparráðnum er av teirri greiðu áskoðan, at tað sum ikki kann standa eigur at falla, sum hann tekur til.

– Royndirnar vísa greitt, at tað er skeivt at varðveita vinnur við almennari hjálp, sum ikki klára seg. Tá vinnan so endaliga fellur, er fallið ofta enn størri, enn um hon upprunaliga slapp at tillaga seg uttan almenna hjálp, vísir Hermann á.

Lat fara

søgulig rættindi ella onnur rættindi til vinnu, kann ikki ræða um at lata rækjuvinnuna tillaga seg sjálva uttan almenna hjálp. Hann er sannførður um, at skilabesta loysnin er at lata tey skipini, sum framvegis bera seg, býta rækjukvoturnar millum sín. Skipini, ið ikki standa seg í kappingini, eiga hinvegin at fara av knóranum.

– Seinastu árini hava nógvar atfinningar verið um, at fleiri skip hava verið noydd at býta rækjukvoturnar. Varðveita vit tey frægastu skipini í flotanum og lata hini fara, verður meira í part. Við størri kvotum verður betri møguleiki hjá rækjuskipunum at klára seg, sigur formaðurin í Búskaparráðnum.

Ringar royndir

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen slerdi staðiliga fast í Degi og viku, at skipanin við afturbering av skatti til rækjuvinnuna tillaga seg sjálva uttan almenna hjálp. Hann er sannførður um, at skilabesta loysnin er at lata tey skipini, sum framvegis bera seg, býta rækjukvoturnar millum sín. Skipini, ið ikki standa seg í kappingini, eiga hinvegin at fara av knóranum.

– Seinastu árini hava nógvar atfinningar verið um, at fleiri skip hava verið noydd at býta rækjukvoturnar. Varðveita vit tey frægastu skipini í flotanum og lata hini fara, verður meira í part. Við størri kvotum verður betri møguleiki hjá rækjuskipunum at klára seg, sigur formaðurin í Búskaparráðnum.

Keðilig fráboðan

Síðan álvarsamu kreppuna fyrst í nítiárunum hevur politiski myndugleikin verið ógvuliga varin við at veita føroyska vinnulívinum stuðul. Hermann Oskarsson er sig hava ilt við at trúgva, at ætlanin hjá landsstýrinum bert verður í tvey ár, tí søguligu royndirnar siga nakað annað.

– Slíkar áramáls skipanir vísa seg ofta at gerast endaligar. Eg kann nevna skipanina við fiskiloyvum, sum upprunaliga skuldi ganga út í ár, men kortini er søla og keyp av fiskiloyvum framvegis í hæddini. Verður ætlanin hjá landsstýrinum veruleiki, beri eg stórliga ótta fyri, at skipanin ikki verður avtikin aftur, vísir formaðurin í Búskaparráðnum á